# Íbúðirnar á Stoffalág og fyriskipanin á Sundsvegnum – Samandráttur frá eftirlitinum

Hetta eftirlitið fevnir um íbúðirnar á Stoffalág og einstaklingafyriskipanina á Sundsvegnum. Íbúðirnar á Stoffalág fevna um fimm íbúðir til vaksnar borgarar við seinheilaskaða, og eitt felagshús. Tilboðið er mannað alt samdøgrið. Dentur verður lagdur á at skapa tryggar karmar og eitt so vanligt og heimligt lív, sum til ber. Einstaklingafyriskipanin á Sundsvegnum er eitt tilboð til ein borgara við seinheilaskaða.

**Trivnaður og menning hjá húsfólkum**
Eftirlitið vísir, at húsfólkini yvirskipað hava ein tryggan gerandisdag, har starvsfólkini eru nærverandi, og tey leggja dent á ein róligan og virðiligan samskiftishátt. Nøkur húsfólk hava avmarkað samskifti, og tí verður trivnaðurin hjá teimum í størri mun tulkaður út frá atferð, rútmu og kropsligum atburði. Samlað sæst, at trivnaðurin er støðugur, og at møguleikar eru at arbeiða víðari við menning, sosialari luttøku og dagligum virksemi.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkini vísa ein jaligan hugburð og kenna væl tørvin hjá húsfólkunum. Tey arbeiða við umsorgan, tolni og eini fakligari tilgongd, har tryggleiki og støðufesti eru í miðdeplinum. Arbeiðið er fjølbroytt og krevjandi, og starvsfólkini hava góðar royndir innan bæði røkt og dagligan stuðul. Skjølini vísa á, at starvsfólk hava fylgt viðkomandi skeiðum, eitt nú KRAP, og at tey hava greiða fatan av tørvunum hjá húsfólkunum. Samstundis er tað sjónligt, at starvsfólk vilja hava fleiri møguleikar fyri fakligari menning og regluligari vegleiðing, soleiðis at tey kunnu styrkja menningina í tilboðinum. Eftirlitið vísir sostatt á ein fakligan grundvøll, sum kann styrkjast víðari við meiri skipaðum førleikamennandi tilboðum frameftir.

**Ætlan og virkisætlan**
Innleiðandi dokumentatión, innskrivingarskjøl og lýsingar av tørvi eru væl skrivað og greið. Virkisætlanir verða brúktar í tilboðunum, tó ikki eins skipað í báðum. Í nøkrum pørtum eru virkisætlanirnar undir uppbygging. Starvsfólkini vísa vilja til at arbeiða støðugt við teimum, soleiðis at mál, átøk og menning verða enn meira sjónlig og samskipað. Umframt at arbeiða við ætlaðum málum, hevur gerandisformurin stóran týdning, tí húsfólk hava ymiska orku, samskiftismøguleikar og dagligar fortreytir frá degi til dags. Eftirlitið vísir, at grundarlagi er gott, og at virkisætlanirnar kunnu brúkast enn meira virkið, sum eitt amboð til fakligan samanhang, samskifti og menning.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðslagið er lagt eftir einum róligum og umsorganarríkum hugsunarhátti, har starvsfólk leggja seg eftir at skapa tryggleika og góðar relatiónir. Tilgongdin er eyðkend av virðing, nærleika og skili fyri tørvi, og starvsfólkini arbeiða miðvíst við at laga dagin eftir førleikum og orku hjá hvørjum borgara. KRAP er kent millum starvsfólk, men verður brúkt í minni mun. Nógv av arbeiðinum byggir á praktiskar royndir og dagliga samskiftisvenju. Hetta

gevur eina natúrliga og støðuga tilgongd, sum kann styrkjast víðari við einum felags námsfrøðiligum leisti, har meira kemur á skrift. Samlað er arbeiðslagið gott, mennandi og lagað til málbólkin. KRAP kann við fyrimuni setast meira í verk.

**Organisatión og leiðsla**
Leiðslan hevur verið tøk og til reiðar at tosa við starvsfólk, og starvsfólk uppliva eitt gott samskifti og álit í dagliga samstarvinum. Leiðslubroytingar og sjúkraskriving hava merkt seinastu tíðina, og tað hevur av og á gjørt dagligu samskipanina minni greiða.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir og áheitianir:

*Heitt verður á Almannaverkið um at gera greiðar niðurskrivaðar ætlanir, við t.d. lutmálum og tíðarásetingum, í sambandi við ætlaðu samanleggingina av tilboðunum á Sundsvegnum og á Stoffalág.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Almannaverkið er í ferð við hetta arbeiðið.

*Heitt verður á Almannaverkið um at taka starvsfólkini við í tilgongdina at fyrireika samanleggingina.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Felags fundur hevur verið, og ætlan er løgd fyri, hvussu starvsfólkini í Stoffalág læra nýggjar borgarar at kenna áðrenn flytan. Tað verða framhaldandi felags fundir.

*Mælt verður til, at starvsfólkabólkurin bæði fær supervisjón í bólki og tilboð um einsæris supervisjón.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Ætlan er løgd fyri supervisjón í 2026.

*Heitt verður á tilboðið um at skipa verður fyri fleiri tiltøkum í felagshúsinum, og at hvør einstakur verður stuðlaður í at vera virkin í gerandisdegnum.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Felagshølið var upprunaliga gjørt til eitt arbeiðshøli fyri øll starvsfólkini í Stoffalág, har høli kundi brúkast viðhvørt til okkurt felags fyri borgararnar. Tað verður gjørdur døgurði hvønn dag, har allir borgararnir koma at eta saman. Er nakað serligt á skrá, so samlast nøkur eina løtu um kvøldið. Borgararnir verða stuðlaðir í at verða virkin,

alt eftir tørvi og førimuni hjá tí einstaka. Borgararnir eru sera ymiskir og hava sera ymiskan tørv.

*Heitt verður á tilboðið um at gera dagsskráir til húsfólkini – serliga til húsfólk, ið ikki fara á dagtilboð.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Dagskrá er fyri einkultar borgarar, sum ikki koma fram í eftirlitsfrágreiðingini, men har manglar ein eftirmeting. Farið verður undir at arbeiða meira tilvitað við dagsskrá fyri borgarar, ið ikki fara á dagtilboð.

*Mælt verður til, at Almannaverkið samskiftir við Almanna- og heilsumálaráðið um ivamálini, sum eru viðvíkjandi tannlæknahjálp.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið fer at taka stig til, at viðkomandi fær tannlæknahjálp.

*Heitt verður á tilboðið um at tryggja, at fráboðanir um harðskap verða skrivaðar, og at starvsfólkini fáa hjálp við hesum, um tey ivast. Eisini verður heitt á leiðaran um at gera eitt støðugt arbeiði við at greina fráboðanirnar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at betra um arbeiðið við harðskapi.

*Mælt verður á tilboðið í størri mun at nýta námsfrøðilig amboð til at minka um spentar støður, sum t.d. “low arausal” og “ferðsluljósskipan”.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at legga undirvísing til rættis í seinheilaskaða og øðrum arbeiðsamboðum, t.d. KRAP og low arausal.

*Heitt verður á tilboðið um at fáa virkisætlanir at virka sum ætlað.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at gjøgnumganga og dagføra virkisætlanir.

*Mælt verður til, at KRAP verður nýtt; eftirlitið hevur sæð, at tað verður nýtt í øðrum tilboðið til seinheilaskaða, so fakliga letur hetta seg gera.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at arbeiða við KRAP sum skjótast.

*Mælt verður til, at starvsfólk fáa ta vitan um seinheilaskaða, sum teimum manglar. Eftirlitið hevur sæð henda tørv á øðrum tilboðnum eisini, og heitir tí á Almannaverkið um at umhugsað, um okkurt skuldi verið gjørt í felag, men so má okkurt eisini gerast í mun til einstaka tilboðið.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verur undir at fyriskipað undirvísing í seinheilaskaða.